# Strongdu italsku stjørnurnar

**Føroyska liðavrikið var framúr gott, og tað smakkaði italsku áskoðarunum illa, at teirra lið ikki megnaði meiri enn tepran sigur á føroysku amatørunum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



Tað er púra burturvið at ímynda sær, at nýggja ættarliðið av fótbóltsspælarum hjá Italia, sum fyri einum ári síðani vann heimsmeistaraskapin í fótbólti, skal hava nakrar sum helst trupulleikar av at syfta føroysku amatørarnar, sum fyri fyrstu ferð royna seg í EM undankapping fyri U-21 landslið. Men soleiðis var tað fríggjakvøldið í norðuritalska býnum Trento.

Tað var ikki fyrrenn sjey minuttir undan leikloki, at tað eydnaðist fimm faldu europameistarunum fyri U-21 landslið at skjóta sigursmálið.

Miðskeiðis í 1. hálvleiki hevði Italia lagt seg á odda. Men Føroyar svaraðu aftur fimm minuttir seinni, og hóast Italia var bóltførandi og spældi seg til málmøguleikar, so vóru teir á heimaliðnum ikki álvuligir við støðuna. Teir fingu væl og virðiliga at vita frá kræsnu áskoðarafjøldini, at hetta var ikki nóg gott, og venjarin hevði sovornan ampa á sær, at hann ongantíð setti seg niður.

- Eingin ivi var um, at teir áttu nógv betri fótbóltsspælarar, enn okkara vóru tað. Men vit vóru betri skipaðir, enn teir vóru tað, og tí gekk tað, sum tað gjørdi. Talan var um ógvuliga sannførandi liðavrik, sigur annar av venjarunum, Bill Jacobsen, sum rósar føroysku spælarunum fyri alla tíðina at hava verið tilvitaðar um konseptið.

- Luturin hjá okkum var fyri tað mesta at verja, og tað megnaðu vit væl. Giovinco var framúr við sínum títta fótskifti og snildu sneiðingum, men teir spældu seg ikki til so nógvar upplagdar møguleikar, og tá ið teir royndu seg ímóti málinum, var Gunnar Nielsen sera tryggur, greiðir venjarin frá.

Føroyska liðið bíðaði eftir mótstøðumonnunum, sum vóru týðuliga kroystir av støðuni. Sjey minuttir undan leikloki skoraðu teir sigursmálið. Men tá ið dómarin hevði bríkslað fyri síðstu ferð, ynsktu italsku ábyrgdarmenninir føroyingum tillukku við góða avrikinum.

At tapa er ongantíð serliga hugaligt. Men sjálvandi verður tað lagt til merkis, at Italia vann við somu tølum ímóti Føroyum, sum italiumenn fyri tveimum vikum síðani vunnu vinardyst ímóti Fraklandi við.

- Vit høvdu vóna, at tað skuldi eydnast, tá ið vit høvdu bóltin, at spæla frá málverjanum og fram eftir vøllinum. Men teir pressaðu okkum so mikið frammarlaga, at Gunnar Nielesn í flestu førum noyddist at sparka langt. Hann sparkar ógvuliga langt, og tí løgdu vit stóra orku í at vinna næstu bóltarnar, sum duttu niður á teirra helvt. Tá ið tað eydnaðist, megnaðu okkara ikki so sjáldan at samanspæla, greiðir Bill Jacobsen frá.

Umframt útjavnandi málið, sum Einar Hansen úr stórari fjarstøðu skoraði mest sum burtur úr ongum, høvdu føroyingar onkra aðra roynd á málið.

Eina tí bestu stóðu innskiftararnir Chritian R. Mouritsen og Arnbjørn Hansen fyri eftir uppspæl í høgru. Men italski málverjin beindi bóltin upp um málið, eftir at Christian hevði roynt seg.

## FAKTA

**Italia-Føroyar 2-1 (1-0)**
**U-21 EM undankappingardystur**
**Í Trento í Italia fríggjadagin 7. september 2007 kl. 21**
1-0: Andrea Russotto 26.
1-1: Einar T. Hansen 31.
2-1: L. Cigarini 81.
**Dómarabólkur úr Bosnia Hersegovina:** Rusmir Mrkovic, Mujo Tutun, Drago Cule og Meviudin Efendic
3.100 áskoðarar
**Italia:** Andrea Consigli, Rimini Calcio - M. Motta, liðformaður, Torino (Francesco Pisano, Cagliari, 46.), L. Marzoratti, Empoli, Marco Rossi, Parma, D. Criscito, Juventus - L. Cigarini, Parma – Andrea Rusotto, Treviso (Arturo Lupoli, Fiorentina, 56.), D. Dessena, Parma, C. Marchisio, Empoli, S. Giovinco, Empoli - N. Pozzi, Empoli (Robert Acquafresca, Cagloiari, 65.).
Venjari: Casiraghi
**Føroyska liðið:** Gunnar Nielsen, liðformaður, Blackburn – Jónas Þór Næs, AB, Jóhan Troest Davidsen, NSÍ, Poul Thomas Dam, HB, Einar T. Hansen, NSÍ – Levi Hanssen, Skála – Magnus Olsen, B71 (Christian R. Mouritsen, Manchester City, 73.), Bogi Løkin, NSÍ, Emil Nolsøe Leifsson, HB (Ólavur í Ólavsstovu, HB, 64.), Jóhan V. Gunnarsson, B36 – Páll M. Joensen, HB (Arnbjørn Hansen, EB/Streymur, 67.).
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** Símun Rógvi Hansen, B71, Pætur Jørgensen, HB, Sam Jacobsen, GÍ, Kristoffur Jacobsen, KÍ
**Gult kort:** Emil N. Leifsson, Páll M. Joensen, Christian R. Mouritsen
**Venjarar:** Heðin Askham og Bill Jacobsen

# Gott samanspæl millum Norðurlond

**Eftir javnleikir í Stokholm og Reykjavík hava danir framvegis møguleika sjálvir at spæla seg í EM endaspæli**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*sosialurin.fo" joannes@sosialurin.fo*

Norðurlendska klaverið spældi væl í EM undankappingarbólki F í leygarkvøldið. Undan umfarinum varð tað roknað við, at tað var alneyðugt hjá dønum at vinna øll stigini í Stokholm, um tað framvegis skuldi verða hugsningur um danska luttøku í endaspælinum næsta summar. Grannauppgerðin í Stokholm endaði 0-0.

Svøríki er greitt oddalið og størsti favorittur at røkka endaspælinum, men danir halda seg framvegis hava góðan møguleika. Tað kemst av, at hini úrslitini lagaðu seg so væl fyri Danmark.

Hjá Íslandi hevur tað ikki hilnast væl, men í leygarkvøldið megnaðu grannar okkara fyri vestan 1-1 á heimavølli ímóti Spania, sum longu í 20. minutti misti Liverpool spælaran Xabi Alonso. Emil Hallfredsson legði Ísland á odda í 40. minutti, og leiðsan helt sær inntil innskifti Andres Iniesta javnaði í 86. minutti.

Umframt frá Íslandi fingu danir eisini hjálp í Litava, har Norðurírland, sum higartil hevur staðið seg so væl, óvæntað tapti 1-0.

Støðan: Svøríki 19 stig, Norðurírland og Spania 16 stig og Danmark 11 stig. Danmark hevur spælt sjey og hini átta dystir.

Roknistykkið hjá dønum sigur, at um teir fáa fult allar fimm ferðirnar, sum eru eftir at spæla, so vera teir við í endaspælinum. Skráin hjá Danmark: 12.9.: Danmark-Liktinstein, 13.10.: Danmark-Spania, 17.10.: Danmark-Litava, 17.11. Norðurírland-Danmark, 21.11.: Danmark-Ísland.